DAGSINS MEINING

At váða sær

Í samband við kreppuna í alivinnuni verður tosað um, hvør eigur váðan. Váðan eiga fyrst og fremst partaeigarnir í teimum feløgum, ið reka alivinnuna, og harnæst eru tað peningastovnarnir. Hetta skuldi verið so einfalt, ella er tað nú tað?

Um vit skulu trúgva teimum kreftum, ið hava eina heldur naiva uppfatan av búskapi, so eigur landið at lata alivinnuna og tey virki, ið figgja, sigla sín egna sjógv, og so fara marknaðarkreftirnar at orna rest. Tað kemur at henda ein sokallað "justering".

Trupulleikin er bara tann, at slíkar bláoygdar teoriir ikki passa til føroyska búskapin. Sjálvt liberalismunar flaggberi USA hevur ikki álit á, at marknaðarkeftirnar automatiskt orna alt, tá tað kemur til egnan flogídnað og stáldnað. Heimurin er ongatið svartur ella hvítur. Eitt stórt land við nógvum vinnugreinum, kann dúva upp aðrar vinnugreinar, skuldi ein einstøk vinnugrein farið fyri bakka. Í einum slíkum landi kunnu marknaðarkreftirnar orna tingini, tá talan er um ein avmarkaðan part av vinnuni, ið ikki upp á nakran máta er ein dominerandi partur í samfelagsbúskapinum. Danir selja framvegis bacon, Lego og Danfoss termostattar fyri tað, um fiskivinnan ella tekstilvinnan er í trupulleikum.

Her í Føroyum er trupulleikin heilt ein annar. Vit hava alt ov fáar útflutningsvinnur. Fer alivinnan fyri bakka, ja so merkir tað í hvussu so er eitt fall uppá ein fjórðing í føroyska útflutningsvirðinum. Longu sum er, er støðan álvarslig, og tað fall í útflutningsvirðinum, ið longu nú kann staðfestast, fer at sláa ígjognum hjá keypmonnum og klippistovum seinni í ár og næsta ár.

Trupulleikin í alivinnuni er ein landstrupulleiki og búskaparliga stagneringin kann skjótt gerast ein samfelagskreppa í orðsins rætta týdningi. Tí er tað gott, at alivinnan fer at verða viðgjørd politiskt, tí trupulleikin kann skjótt gerast politiskur allikavæl, og tá er betur hjá politiska valdinum at verða uppá forkant.

At dúva uppá, at marknaðurin justerar seg sjálvan kann verða ein vanlukka. Eina slíka "justering" sóu vit fyrst í nítiárunum. Trupulleikin var bert tann, at fólk, ið gjørdust arbeiðsleys ella mistu virkir fóru ikki heim til hús og uppfunnu nýggjar vinnur, sum tey annars burdu gjørt sambært liberalistiskari teori. Tey stungu í sekkin og fluttu niður til Danmarkar, ístaðin fyri eldhugað at kasta seg yvir innovativa nýggja framleiðslu. "Justeringin" merkti, at fólk flutti av landinum. Hetta er ein sannroynd, og yngru betongliberalistarnir í Tjóðveldisflokkinum mugu koma við einari frágreiðing, um hví hetta ikki kann henda aftur.

Tá nú alivinnan verður viðgjørd, so eiga politikarar tó at verða á varðhaldi, so Fólkaflokkurin ikki fer at skriva gávukekkar út. Skal landið veita styrk av onkrum slag, og tað má eitthvørt land viðhvørt, so eiga treytir at fylgja við til tey, ið áttu váðan. Studningspolitikkur hevur verið tabu evni í nógv ár, tí heimurin er gjørdur svart/hvítur, við tí úrsliti, at vit eru farin úr veitini einu megin vegin í veitina hinu megin vegin.

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

Pædofili á føroyskum heimasíðum

Ása Andreasen
Tórshavn 16. juli 2003

Havi hug at gera eina viðmerking til Búa Tyril, sum í eini viðmerking í Sosialinum og Dimmalætting 16. juli 2003 greiddi frá, at hann hevði sæð pædofilt tilfarð verða spreitt út á einari føroyskari heimasíðu. Eg haldi tað verða gott, at Búi setur hetta evnið á dagskránna. Fólk sum hava ábyrgd av heimasíðum, har t. d. tjaktorg er ein møguleiki, hava ábyrgd av tí, sum liggur á hesum síðum.

Tjaktorg ein løtt kelda at spjaða ótespiligt tilfar

Fyri uml. 1,5 árum síðani var eg úti fyri einari líknandi hending, sum Búi greiddi frá. Eg sat og "surfaði" eitt sindur á internetinum eitt kvøldið. Kom fram á nakrar slóðir um nýggjar føroyskar heimasíður og helt tað kundi verið áhugavert at síggja, hvat føroyingar nú høvdu funnið uppá.

Ein av hesum føroysku heimasíðum hevði eitt tjaktorg, sum eg fór inn á. Orðini í einum av innleggunum bendu heilt týðuliga á pædofili. Tað vóru orð sum "adults, parents, sex" o.l. Harafturat hevði viðkomandi eisini lagt nakrar slóðir á tjaktorgið. Eg varð øgiliga kløkk av hesum, men helt at eg skuldi kanna hetta nærri og fór inn á eina slóð. Tann slóðin beindi meg beint inn á eitt tað mest óhugnaliga eg havi verið úti fyri. Ein síða við myndum av børnum og slóðum við sigandi teksti, so sum "Father and 10'year old" o. l. Tú kanst ikki ímynda tær, hvat fyri myndir vóru at síggja handan hesar slóðir.

Eg var veruliga skakað og illa fyri av hesum og ringdi sjálvandi beinanvegin til eigaran av heimasíðuni og spurdi, um viðkomandi varð greiður yvir, hvat stóð á hansara heimasíðu/tjaktorgið. Tað var viðkomandi ikki, hann hevði ikki verið inni á tjaktorginum í eina tíð. Lítla løtu seinni var innleggið slettað.

Ringdi til politistøðina

Eg ringdi síðan til politistøðina í Tórhavn og greiddi frá hendingini. Helt at løgreglan átti at veri áhugað í hesum, tí talan var um eina føroyska heimasíðu, og tí var tað sannlíkt, at talan var um ein føroying. Eg eri annars rættiliga vís í, at talan veruliga var um ein føroying, tí nøkur av orðunum í innlegginum vóru føroysk, hóast tey flestu vóru á enskum.

Eg helt, at tað burdi verið í áhugamálunum hjá føroysku løgregluni at fingið slíkar upplýsingar, og tí ringdi eg til teirra.

Vakthavandi løgreglumaðurin segði, at hetta gjørdu teir einki við í Føroyum. Hann bað meg ringja til Keypmannahavn!!! Hann vildi ikki eingang vita, hvør føroyska heimasíðan var!!! Eg fór so at leita mær telefonnummarið hjá donsku løgregluni fram og ringdi til løgregluna í Keypmannahavn, sum hevði eina deild, ið arbeiðir við slíkum málum.

Tá eg læs viðmerkingina hjá Búa Tyril, sum hevði sæð pædofilt tilfar spreitt út á føroyskari heimasíðu, helt eg, at eg skuldi siga frá mínum upplivilsi. Í hesum sambandi vil eg nevna, at talan er um tvær ymiskar heimasíður. Eg havi ikki illgruna til, at eigarin av heimasíðuni yvirhøvur er innblandaður í hetta. MEN eg vil bara minna fólk, sum eiga og umsita heimasíður, á at ansa eftir teimum. Tit hava samábyrgd, um slíkt tilfar verður breitt út umvegis tykkara heimasíður.

Eg vóni at løgreglan í Tórshavn hevur fingið eina aðra mannagongd hesum viðvíkjandi. Tað kann ikki verða meiningin, at ein borgari, sum ger sína skyldu, verður biðin um sjálv/-ur at ringja til løgregluna í Danmark við slíkum málum.

Íslendingar sjóseta G! 2003

Torfinnur Jákupsson

Grannatjóð okkara Ísland má sigast at vera best umboðaða tónleikaútlandið á G! festivalinum, ið verður um vikuskiftið í Gøtu. Og festivalurin, ið eftir ætlan skuldi sjósetast fríggjakvøldið, byrjar nú kvøldið fyri - við einum røttum íslendskum byrjunarskoti.

Fyriskipararnir fyri G! festivalin avgjørdu í seinastu viku at byrja festivalin eitt kvøld fyrr, og skráin fyri fyrsta festivalkvøldið, tvs. hóskvøldið, inniheldur ikki færri enn tríggjar íslendskar bólkar. Ein av høvuðspersónunum á G! skrivstovuni í Syðrugøtu, Sólarn Solmunde, heldur eina góða orsøk vera til, at tað eru tríggir íslendskir bólkar við á festivalinum í ár.

"Persónliga meti eg íslendska rokkpallin vera á einum sera høgum støði. Í mun til m.a. tann føroyska tónleikapallin, haldi eg, at íslendingar fara longur, tá ið teir leita sær eftir íblástri, og tí mennist tónleikurin kanska eisini skjótari enn tann føroyski," sigur hann. "Tí meti eg eisini, at eitt gott útboð av íslendskum tónleiki hesum viðv. kann vera sera mennandi fyri føroyska tónleikapallin."

"At hóskvøldið, ið nú er fyrsta festivalkvøldið, inniheldur allar teir íslendsku bólkarnar á festivalinum er eitt sindur stuttligt," heldur Sólarn. "Eg var í Íslandi herfyri, har eg hitti Ensimi. Tað vóru í veruleikanum teir, ið komu við hugskotinum um at hava eitt kvøld, áðrenn festivalurin byrjaði, har fólk kundu líkasum hita upp til festivalin."

Ensimi er fyrsti bólkur á høvuðspallinum á gøtusandi fríggjakvøldið.

"Tað helt eg vera eitt fráfelt hugskot. Tað er bæði feitt fyri teir sum tónleikabólk og okkum sum fyriskiparar. Soleiðis sleppa teir betri framat við sínum tónleiki, og vit kunnu bjóða festivalgestunum eitt feitt tiltak afturat."

"Og á henda hátt koma fólk kanska eisini fyrr á festivalin, so vit fáa gjørt meir arbeiði fyrr, so sum tað at avgreiða atgongumerki osfr."

Hóskvøldið byrjar við íslendska sangaranum og lagsmiðnum Rúnar. Rúnar

Framhald á næstu síðu

Sosialurin

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Fíggjarleiðari: Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad
finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo

Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

Myndamenn:
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

Sosialurin í Norðoyggjum:
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
Sosialurin í Suðuroy:
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
Sosialurin í Eysturoy:
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo
Sosialurin í Vágum:
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

Uppseting/prent:
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin
Avgreiðsla:
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Fríggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.

VIÐMERKINGAR

Alivinna-kapitalur

Eivind Jacobsen
Strendur

Seinastu tíðina hava fleiri bankastjórar vístá, at alivinnuni tørvar kapital. Øll alivinnan er um at fara á húsagang.

Long tíð er síðan ILA varð staðfest fyrstu ferð. Tí meini eg avgjørt, at orsøkin til støðuna er, at alt ov nógv er sett út. Vinnan hevur expanderað meira enn eginpeningurin upp á uml. 5-600 mió. kundi bera. Váðin var heilt einfalt ov stórur. Men tað er sjálvandi lætt at siga í dag.

Okkurt má gerast. Men ivi tykist verða um, hvør hevur ábyrgd og eigur at taka um endan. Bæði fyrrverandi og núverandi løgtingslimir vísa á, at bankarnir eiga ábyrgdina. Tað skilji eg ikki rættuliga.

Uppgávan hjá bankum er at forrenta pengar, sum palliba o.o. hava lánt bankunum. Hetta gerst bert um lænt verður til fyritøkur og persónar, sum gjalda lán aftur við rentum. Taka bankarnir ábyrgd fyri samfelagnum og geva lán uttan at fáa pengarnar aftur, er tað ikki bankarnir, men palliba o.o. sum gjalda.

Um Bankarnir heldur velja at lækka innlánsrentuna, taka tey, sum hava innlán sínar pengar út. T.d. gera Arbeiðarafeløg pensjónsavtalur uttanlanda. Tryggingarfeløg keypa Obligationir ella partabrøv uttanlanda. Úrslitið er, at bankarnir ongar pengar hava at lána út.

Hækka bankarnir útlánsrentuna, velur palliba bíliga útlendska bilfigging frá bilhandlarum. Úrslitið av hesum er, at bert tey, sum ikki gjalda lán aftur, biðja um lán.

Havast skal eisini í huga, at bankar ikki kunnu taka okursrentu tá tað gongur væl, fyri at geva aftur tá tað gongur minni væl.

Tekur Føroya Løgting ábyrgd?!

Løgtingslimir kunnu gera ymiskt. T.d. taka ábyrgd fyri tí lóggávu, teir sjálvir hava gjørt.

Bankarnir hava fleiri ferðir vístá, at um aliloyvi kundu verið sett í pant hevði tað økt um møguleikarnar fyri figging.

Útlendingar kunnu í mesta lagið eiga 33%. Hetta er ein forðing fyri at kapitalur kemur í vinnuna.

Landið gav aliloyvir gratis, ókeypis, forerandi fyri einki, til ávísar persónar. Alt framtíðarvirðið av alivinnuni er tí avreitt til nøkur útvald, sum við vinningi hava selt aliloyvir. Hetta er við til at drena vinnuna fyri milliónir í likviditeti.

Havi ikki nakra meining um, hvat rættast er at gera. Men mál, sum hava stóran týdning fyri samfelagið enda sum oftast í landskassanum. Ikki bara í Føroyum. Hetta hendur, sjálvt um øll (uttan fólkaflokkurin?) eru samd um, at har hoyra tey ikki heima. Livst so spyrst.

Ikki at bora Øravík - Hov – er hol í høvdi

Henrik Old

Nú avgerðin er tikin um, hvør skal gera samferðsluhavnina á Trongisvágsfirði, sær tað út til, at tann partur av løgtingslógini um samferðsluhavnina, har sagt verður, hvar mesta grótið skal takast frá til samferðsluhavnina, er burturgloymdur.

Tá tríðja viðgerð av hesum máli skuldi avgreiðast í løgtinginum, fekk ein varhugan av, at ein politisk samsvørjing hevði tikið seg upp ímóti at knýta samferðsluhavnina saman við tunnilsgerðini millum Øravík og Hov, soleiðis sum løgtingið við aðru viðgerð hevði samtykt stutt frammman undan.

Tað sær út til, at landsverkfrøðingurin eisini hevur fingið boð um, at tað ikki hastar at gera tær kjarnuboringar, sum ter sjálvir ráða til, áðrenn byrjast kann við tunnilsgerð í neðra millum Øravík og Hov.

Uppá fyrispurning frá Vinnunevndini um kjarnuborðingarnar ikki kundu gerast skjótari enn tríggjar til fýra mánaðir, svaraði landsverkfrøðingurin, at um politiski viljin var til staðar, so kundi borast longri enn vanligan arbeiðsdag og sostatt kundi tíðin til hesar kjarnuboringar styttast munandi. Men sjálvt um ljóst hevur verið alt samdøgrið síðsta mánaðin er bert bora í 8 tímar. Sostatt verða hesar royndarborðingar við vilja toygdar so langt út, sum møguligt, og nú hoyrdist í útvarpinum at hetta fór at taka rúma tíð enn.

Tað gekk skjótari hjá NCC at bora, spreingja og koyra út úr Vágatunnlinum, enn tað gongur hjá landsverkfrøðinginum at bora eitt klænt hol beint niðureftir í Hovshaganum. So tað er týðiligt at boðini eru »so seint sum gjørligt«.

Tað er heilt ófatiligt, at tað skal verða neyðugt hjá landsverkfrøðinginum at gera dýpdarmátingar á Trongisvágsfirði fyri at finna fram til um nýggi Smyril kann leggja at aðrastaðni á fjørðinum, tá teir sum skulu gera nýggju havnina kunnu gera hana lidna í novembur næsta ár, og Smyril í besta lagi fer úr Spaniu hálvan oktober.

Betur mátti verið at brúkt hesar pengar og kreftir upp á at kjarnubora Øravíkar megin.

Eisini eigur at verða mint á, at norska felagið, sum boraði Vágatunnilin skeyt upp at bora og sikra tunnilin millum Øravík og Hov uttan at gera hann koyriklíðan, fyri at fáa fatur á grótinum. Hetta kundi gerast fyri millum 65 og 70 mió. og verða liðugt næsta summar.

Um landsstýrissamgongan roknar við, at hetta bara verður gloymt burtur, so skulu teir trúgva umaftur, tað eru einans fjúrtan dagar eftir, til tingið kemur saman aftur.

Annars fari eg at ynskja byggifelagnum, sum skal gera samferðsluhavnina, góða eydnu við arbeiðnum.

Framhald av síðu 10

er m.a. kendur úr íslendska bólkinum Náttfari, og er skyldur við føroysk nøvn sum Hanus G. Johansen, og altjóða nøvn sum Bob Dylan.

Næst á pallinum verða Úlpa, ið áður hava verið at hoyrt í Føroyum, og m.a. finnast á savnsfløguni hjá Tutl „Tutl 25 ár". Úlpa er ein av best kendu bólkunum í Íslandi, og endaðu m.a. á tríðjaplássinum fyri bestu fløgu í Íslandi í 2001. Úlpa hava ein seregnan tónleikastíl, ið ber brá av melidiøsa og eksperimenterandi rokktónleikinum.

Síðst á pallinum verður bólkurin Ensimi, ið seinastu árini hevur vunnið sær alsamt størri virðing. M.a. vunnu teir sær heiðurin sum besti nýggi bólkur í Íslandi í '99 við sínum progressiva og melidiøsa rokktónleiki, og hava teir síðani verið á fleiri stórum konsertferðum, eitt nú í USA.

Byrjunarskotið til festivalin hóskvøldið, ið bert inniheldur íslendskar bólkar, er kanska eisini ein ábending um, hvussu fyriskipararnir fyri G! festivalin raðfesta sín áhuga í at fáa tónleik, ið rørir seg millum tónleikararnar í umhvørvinum hjá Grót, út ímillum fólk. Tað er eingin loyna, at av nógvu nøvnunum á G! festivalinum eru fleiri, ið vanligi áhoyrarin í Føroyum lítið og onki kennir til. M.a. teir, ið fara á pallin í Losjuni hóskvøldið. Er so ikki ein vansi í at bjóða so fjølbroyttan tónleik fram fyri einum so "lítlum" el. "óroyndum" áhoyraraskara at kalla, sum tí føroyska?

"Jú, tað er sjálvandi ein vansi í tí. Men eg sakni eina broyting í hugburðinum hjá fólki, ein størri opinleika fyri nýggjum tónleiki. Føroyingar er ov afturhaldnir. Tey eru mestsum bangin fyri at hoyra okkurt nýtt."

Hann heldur, at skuldu bara bólkar spælt, ið fólk kendu frammanundan, so hevði eingin møguleiki verið fyri, at festivalurin hevði verið bótaførur. Sólarn heldur, at ein lutfalsliga bíligur, ókendur bólkur kann bera nógv størri íblástur til føroyska tónleikapallin, enn ein dýrur bólkur, ið øll hava hoyrt fyrr.

Tónleikasamtakið Grót er einasti tónleikapallurin hjá nógvum av føroysku tónleikarunum í dag. Er hetta eisini ein háttur at skapað ein føroyskan tónleikapall fyri teim útlendsku tónleikabólkunum, ið royna at vinna fram uttan fyri sínar egnu landoddar?

"Jú, tað er tað. Eg haldi, at høvuðsendamálið hjá Grót er at hjálpa tónleik-inum frameftir, og tvs. bæði føroyskum og útlendskum. Tað hevur verið tað, vit hava lagt mest dent á tey seinnu árini, haldi eg. Hóast G! 2003 bert er okkara fyrsti veruligi festivalur, tykist hann longu at hava lagt grundarlagið undir einum fjølbroyttum útlendskum tónleikapalli á G!, og tað er sera spennandi," heldur Sólarn.

Afturat fleiri útlendskum fjølmiðlum,ið koma hendavegin at vitja festivalin, verða eisini fleiri umboð fyri útlendsk plátufeløg. Er hetta ein beinleiðis avleiðing av, at tit hava fleiri útlendskar bólkar við á festivalpallunum?

"Í ein ávísan mun, ja. T.d. hevur ein av útlendsku bólkunum, ið fara at spæla her á festivalinum, í seinastuni havt samband við tvey stór plátufeløg í Bretlandi, og G! festivalurin verður fyrsti pallurin, teir koma at royna seg framman fyri umboðunum fyri hesi plátufeløg. Tað er ómetaliga spennandi fyri okkum, ið fyriskipa, og ikki minst eisini fyri teir føroysku bólkarnar, ið spæla á festivalinum í ár. Líknandi møguleikar, vóna vit, vaksa alsamt í framtíðini."

Útlitini fyri, at G! festivalurin fer at gerast størsti føroyski pallurin hjá tónleikarum at gera vart við seg úteftir, tykjast sambært Sólarn Solmunde góð.

Sigast má so, at framtíðin sær spennandi út hjá teimum á G! skrivstovuni í Syðrugøtu.

†

Kunngjørt verður fyri ætt og vinum, at góði maður, abbi og langabbi okkara

OTTO ELIESAR CHRISTIANSEN
ættaður úr Sumba
búsitandi í Havn

andaðist á Eldrasambýlinum í Hoydølum tann 14. juli, 82 ára gamal.

Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni hósdagin 17. juli kl. 13.00.

Fyri tey avvarðandi
Maria